67 Rentuinntøkur og vinningsbýti	3.282	0	3.282
86 Afturgjaldan av útlánum v.m.	0	7.380	7.380

Úrslit smb. egnum roknskapi	*5.506*
pluss avskrivingar	*6.948*
minus løgur	*-24.826*
pluss nettoútlán	*7.380*
Úrslit smb. meginreglum landskassans	*-4.993*

Frágreiðing um mun á úrsliti í egnum roknskapi og landsroknskapi

Bústaðir

Stovnsnummar 006931

Fíggjarstøða tann 31. desember 2025 (Tús. kr.)

Tús. kr.	Egin roknskapur	Munur	Landsroknskapur
OGN:			
Útbúnaður			
Grundøki, bygningar, løgur o.t.	831.368	146.591	977.959
Materiellur útbúnaður í gerð	143.070	-143.070	
Útbúnaður	3.520	-3.520	
Virðisbrøv	11.520	0	11.520
Útlán	50.147	0	50.147
Útbúnaður tilsamans	**1.039.626**	**0**	**1.039.626**
Virði í umferð			
Aðrir skuldarar	26.071	0	26.071
Tøkur peningur	33.104	0	33.104
Virði í umferð tilsamans	**59.175**	**0**	**59.175**
OGN TILSAMANS	**1.098.801**	**0**	**1.098.801**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:			
Útjavningarkonta			
Salda 1. januar	16.515	-968.260	-951.744
Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit	5.506	-10.498	-4.993
Mótkonta til útbúnað	0	986.138	986.138
Ymsar broytingar	0	-7.380	-7.380
Stovnsfæ	600.803	0	600.803
			0
Útjavningarkonta tilsamans	**622.825**	**0**	**622.825**
Skuld			
Langfreistað skuld	140.135	228	140.363
Stuttfreistað skuld	335.841	-228	335.613
Skuld tilsamans	**475.976**	**0**	**475.976**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD TILSAMANS	**1.098.801**	**0**	**1.098.801**

Føroya Realkreditstovnur

Stovnsnummar 006831

Rakstrarroknskapur

Tús. kr.		2025	2024
Úrslit		13.837	12.555
Útreiðslur		241.262	207.703
Inntøkur		255.098	220.259
Útreiðslur		**241.262**	**207.703**
11	Lønir v.m.	3.386	2.819
14	Keyp av vørum og tænastum	1.567	1.406
15	Keyp av útbúnaði, netto	1	78
16	Leiga, viðlíkahald og skattur	72	250
53	Stuðul til vinnu	1.340	1.929
57	Rentuútreiðslur o.a.	9.698	12.469
59	Aðrar flytingarútreiðslur	18.140	22.299
82	Útlán v.m.	207.059	166.454
Inntøkur		**255.098**	**220.259**
21	Søla av vørum og tænastum	431	341
67	Rentuinntøkur og vinningsbýti	63.385	77.326
86	Afturgjaldan av útlánum v.m.	191.282	142.591

Føroya Realkreditstovnur

Stovnsnummar 006831

Fíggjarstøða tann 31. desember (Tús. kr.)

OGN:

	2025	2024
Útbúnaður		
Grundøki, bygningar, løgur o.t.	2.131	2.165
Útlán	1.131.608	1.120.436
Útbúnaður tilsamans	**1.133.739**	**1.122.601**
Virði í umferð		
Aðrir skuldarar	15.352	20.939
Virðisbrøv	135.117	132.564
Tøkur peningur	780	193
Virði í umferð tilsamans	**151.249**	**153.696**
OGN TILSAMANS	**1.284.988**	**1.276.297**

ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:

Útjavningarkonta		
Salda 1. januar	-135.774	-148.330
Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit	13.837	12.555
Mótkonta til útbúnað	1.140.343	1.124.601
Útjavningarkonta tilsamans	**1.018.405**	**988.826**
Avsetingar	**0**	**19.087**
Skuld		
Langfreistað skuld	225.960	245.632
Stuttfreistað skuld	40.623	22.752
Skuld tilsamans	**266.583**	**22.752**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD TILSAMANS	**1.284.988**	**1.276.297**

Frágreiðing um mun á úrsliti í egnum roknskapi og landsroknskapi 2025

Føroya Realkreditstovnur
Stovnsnummar 006831

Rakstrarroknskapur 2025

Tús. kr.	Egin roknskapur	Munur	Landsroknskapur
Úrslit	39.121	-25.284	13.837
Útreiðslur	24.695	216.566	241.262
Inntøkur	63.816	191.282	255.098
Útreiðslur	**24.695**	**216.566**	**241.262**
11 Lønir	3.386	0	3.386
14 Keyp av vørum og tænastum	1.567	0	1.567
15 Keyp av útbúnaði, netto	1	0	1
16 Leiga, viðlíkahald og skattur	72	0	72
32 Útvegan av løgu o.ø.	34	-34	0
53 Stuðul til vinnu	1.340	0	1.340
57 Rentuútreiðslur o.a.	9.698	0	9.698
59 Aðrar flytingarútreiðslur	8.598	9.542	18.140
82 Útlán v.m.	0	207.059	207.059
Inntøkur	**63.816**	**191.282**	**255.098**
21 Søla av vørum og tænastum	*431*	*0*	*431*
29 Ymsar rakstrarinntøkur	*0*	*0*	*0*
67 Rentuinntøkur og vinningsbýti	*63.385*	*0*	*63.385*
86 Afturgjaldan av útlánum v.m.	*0*	*191.282*	*191.282*

Úrslit smb. egnum roknskapi	*39.121*
minus vinningsbýti	*9.542*
plus avskrivingar	*34*
minus nettoútlán	*15.777*
Úrslit smb. meginreglum landskassans	*13.837*

Frágreiðing um mun á úrsliti í egnum roknskapi og landsroknskapi 2025

Føroya Realkreditstovnur
Stovnsnummar 006831

Fíggjarstøða tann 31. desember 2025 (Tús. kr.)

OGN:

Tús. kr.	Egin roknskapur	Munur	Landsroknskapur
Útbúnaður			
Útlán	1.131.608	0	1.131.608
Grundøki, bygningar, løgur o.t.	2.131	0	2.131
Útbúnaður tilsamans	**1.133.739**	**0**	**1.133.739**
Virði í umferð			
Virðisbrøv	135.117	0	135.117
Aðrir skuldarar	15.352	0	15.352
Tøkur peningur	780	0	780
Virði í umferð tilsamans	**151.249**	**0**	**151.249**
OGN TILSAMANS	**1.284.988**	**0**	**1.284.988**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:			
Útjavningarkonta			
Salda 1. januar	956.398	-1.117.997	-161.599
Mótk. til útlánsroknskap (Ú)	0	1.131.608	1.131.608
Mótk. til immatr. og matr. útbúnað (Stk 01)	0	2.131	2.131
Útlutað vinningsbýti	-9.542	9.542	0
Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit	-39.121	25.284	-13.837
Útjavningarkonta tilsamans	**907.735**	**50.569**	**958.304**
Skuld			
Stuttfreistað skuld	18.543	0	18.543
Langfreistað skuld	225.960	0	225.960
Tíðaravmarkingar	22.080	0	22.080
Skuld tilsamans	**266.583**	**0**	**266.583**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD TILSAMANS	**1.174.318**	**50.569**	**1.224.886**

Yvirtikni Íleggingargrunnurin fyri Føroyar

Stovnsnummar 003100

Rakstrarroknskapur

Tús. kr.	**2025**
Úrslit	62.015
Útreiðslur	26.811
Inntøkur	88.827

Útreiðslur	**26.811**
11 Lønir v.m.	285
14 Keyp av vørum og tænastum	568
16 Leiga, viðlíkahald, skattur	4.610
19 Ymsar rakstrarútreiðslur	0
57 Rentuútreiðslur o.a.	397
82 Útlán v.m.	20.952
Inntøkur	**88.827**
67 Rentuinntøkur og vinningsbýti	27.710
86 Afturgjaldan av útlánum v.m.	61.117

Yvirtikni Íleggingargrunnurin fyri Føroyar

Stovnsnummar 003100

Fíggjarstøða tann 31. desember (Tús. kr.)

OGN:

	2025
Útbúnaður	
Virðisbrøv	410.311
Útlán	300.053
Útbúnaður tilsamans	**710.364**
Virði í umferð	
Aðrir skuldarar	13.311
Tøkur peningur	24.882
Virði í umferð tilsamans	**38.193**
OGN TILSAMANS	**748.557**

ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:

Útjavningarkonta	
Salda 1. januar	-340.428
Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit	62.015
Mótkonta til útlánsroknskap	300.053
Stovnsfæ	715.746
Útjavningarkonta tilsamans	**737.386**
Skuld	
Millumrokning við landskassan	3.101
Stuttfreistað skuld	8.070
Skuld tilsamans	**11.171**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD TILSAMANS	**748.557**

Frágreiðing um mun á úrsliti í egnum roknskapi og landsroknskapi

Yvirtikni Íleggingargrunnurin fyri Føroyar

Stovnsnummar 003100

Rakstrarroknskapur 2025

Tús. kr.	Egin roknskapur	Munur	Landsroknskapur
Úrslit	21.850	40.165	62.015
Útreiðslur	5.860	20.952	26.811
Inntøkur	27.710	61.117	88.827
Útreiðslur	**5.860**	**20.952**	**26.811**
11 Lønir v.m.	285	0	285
14 Keyp av vørum og tænastum	568	0	568
16 Leiga, viðlíkahald, skattur	4.610	0	4.610
19 Ymsar rakstrarútreiðslur	0	0	
57 Rentuútreiðslur o.a.	397	0	397
82 Útlán v.m.	0	20.952	20.952
Inntøkur	**27.710**	**61.117**	**88.827**
67 Rentuinntøkur og vinningsbýti	*27.710*	*0*	*27.710*
86 Afturgjaldan av útlánum v.m.	*0*	*61.117*	*61.117*

Úrslit smb. egnum roknskapi	*21.850*
pluss nettoútlán	*40.165*
Úrslit smb. meginreglum landskassans	*62.015*

Frágreiðing um mun á úrsliti í egnum roknskapi og landsroknskapi

Yvirtikni Íleggingargrunnurin fyri Føroyar

Stovnsnummar 003100

Fíggjarstøða tann 31. desember 2025 (Tús. kr.)

Tús. kr.	Egin roknskapur	Munur	Landsroknskapur
OGN:			
Útbúnaður			
Virðisbrøv	410.311	0	410.311
Útlán	300.053	0	300.053
Útbúnaður tilsamans	**710.364**		**710.364**
Virði í umferð			
Aðrir skuldarar	13.424	113	13.311
Tøkur peningur	24.883	1	24.882
Virði í umferð tilsamans	**38.307**	**-114**	**38.193**
OGN TILSAMANS	**748.671**	**-114**	**748.557**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:			
Útjavningarkonta			
Salda 1. januar	0	340.428	-340.428
Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit	21.850	-40.165	62.015
Mótkonta til útlánsroknskap	0	-300.053	300.053
Stovnsfæ	715.536	-210	715.746
Útjavningarkonta tilsamans	**737.386**	**0**	**737.386**
Skuld			
Millumrokning við landskassan		-3.101	3.101
Stuttfreistað skuld	11.285	3.215	8.070
Skuld tilsamans	**11.285**	**-114**	**11.171**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD TILSAMANS	**748.671**	**-114**	**748.557**

Legat og tílíkt

Dr. Phil Jacob Jacobsen legat

Stovnsnummar 002020

Rakstrarroknskapur

Tús. kr.	**2025**	**2024**
Úrslit	0	0
Útreiðslur	0	0
Inntøkur	0	0
Útreiðslur	**0**	**0**
Inntøkur	**0**	**0**

Dr. Phil Jacob Jacobsen legat

Stovnsnummar 002020

Fíggjarstøða tann 31. desember (Tús. kr.)

OGN:

	2025	2024
Virði í umferð		
Tøkur peningur	37	37
Virði í umferð tilsamans	**37**	**37**
OGN TILSAMANS	**37**	**37**

ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:

Útjavningarkonta		
Salda 1. januar	17	17
Stovnsfæ	20	20
Útjavningarkonta tilsamans	**37**	**37**
Skuld tilsamans	**0**	**0**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD TILSAMANS	**37**	**37**

Den Store Nordiske Telegrafs Gavefond af 1. august 1956

Stovnsnummar 002025

Rakstrarroknskapur

Tús. kr.		2025	2024
Úrslit		-1	0
Útreiðslur		1	0
Inntøkur		0	0
Útreiðslur		**1**	**0**
14	Keyp av vørum og tænastum	1	0
Inntøkur		**0**	**0**

Den Store Nordiske Telegrafs Gavefond af 1. august 1956

Stovnsnummar 002025

Fíggjarstøða tann 31. desember (Tús. kr.)

OGN:

	2025	2024
Virði í umferð		
Tøkur peningur	283	284
Virði í umferð tilsamans	**283**	**284**
OGN TILSAMANS	**283**	**284**

ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:

Útjavningarkonta		
Salda 1. januar	284	284
Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit	-1	0
Útjavningarkonta tilsamans	**283**	**284**
Skuld tilsamans	**0**	**0**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD TILSAMANS	**283**	**284**

Gartner Johannes Hansens Mindelegat

Stovnsnummar 002030

Rakstrarroknskapur

Tús. kr.	**2025**	**2024**
Úrslit	0	0
Útreiðslur	0	0
Inntøkur	0	0
Útreiðslur	**0**	**0**
Inntøkur	**0**	**0**

Gartner Johannes Hansens Mindelegat

Stovnsnummar 002030

Fíggjarstøða tann 31. desember (Tús. kr.)

OGN:

	2025	2024
Virði í umferð		
Tøkur peningur	975	975
Virði í umferð tilsamans	**975**	**975**
OGN TILSAMANS	**975**	**975**

ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:

Útjavningarkonta		
Salda 1. januar	975	975
Útjavningarkonta tilsamans	**975**	**975**
Skuld tilsamans	**0**	**0**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD TILSAMANS	**975**	**975**

Grunnur Torvald Poulsens á Steinum

Stovnsnummar 002031

Rakstrarroknskapur

Tús. kr.		2025	2024
Úrslit		-3	0
Útreiðslur		3	0
Inntøkur		0	0
Útreiðslur		**3**	**0**
14	Keyp av vørum og tænastum	2	0
75	Keyps-mvg	1	0
Inntøkur		**0**	**0**

Grunnur Torvald Poulsens á Steinum

Stovnsnummar 002031

Fíggjarstøða tann 31. desember (Tús. kr.)

OGN:

	2025	2024
Virði í umferð		
Tøkur peningur	1.870	1.870
Virði í umferð tilsamans	**1.870**	**1.870**
OGN TILSAMANS	**1.870**	**1.870**

ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:

Útjavningarkonta		
Salda 1. januar	1.870	1.870
Rakstrar-, løgu- og útlánsúrslit	-3	0
Útjavningarkonta tilsamans	**1.867**	**1.870**
Skuld		
Millumrokning við landskassan	4	0
Skuld tilsamans	**4**	**0**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD TILSAMANS	**1.870**	**1.870**

Grunnur Johannesar og Gunhildar í Dalsgarði til frama fyri Fróðskaparsetur Føroya

Stovnsnummar 002032

Rakstrarroknskapur

Tús. kr.	**2025**	**2024**
Úrslit	0	0
Útreiðslur	0	0
Inntøkur	0	0
Útreiðslur	**0**	**0**
Inntøkur	**0**	**0**

Grunnur Johannesar og Gunhildar í Dalsgarði til frama fyri Fróðskaparsetur Føroya

Stovnsnummar 002032

Fíggjarstøða tann 31. desember (Tús. kr.)

OGN:

	2025	2024
Virði í umferð		
Tøkur peningur	1.022	1.022
Virði í umferð tilsamans	**1.022**	**1.022**
OGN TILSAMANS	**1.022**	**1.022**

ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD:

Útjavningarkonta		
Salda 1. januar	1.022	1.022
Útjavningarkonta tilsamans	**1.022**	**1.022**
Skuld tilsamans	**0**	**0**
ÚTJAVNINGARKONTA OG SKULD TILSAMANS	**1.022**	**1.022**

Formlig viðurskifti

Hvønn fevnir roknskapurin um?

Landsroknskapurin fevnir um allar landsstovnar, t.e. øll stjórnarráðini, stovnar teirra, serligar grunnar o.a., og harumframt eisini sjálvsognarstovnar, sum eru í fíggjarlógini javnbjóðis teimum veruligu landsstovnunum.

Hóast hesa meginásetning eru tað almennir grunnar, sum gera sín egna roknskap, og sum fylgja serlógum.

Grunnar, sum bæði gera sín egna roknskap og eru við í landsroknskapinum, eru t.d.:

- Bústaðir
- Búnaðargrunnurin
- Realurin
- Íleggingargrunnurin

Almennir grunnar, sum gera sín egna roknskap, sum ikki eru við í landsroknskapinum, eru t.d.:

- Arbeiðsloysisskipanin
- Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

Landsroknskapurin skal í uppsetingini fylgja fíggjar- og eykajáttanarlógum fyri árið, talan er um, og skal fevna um allar inntøkur og útreiðslur landsins fyri fíggjarár, ognir og skyldur og broytingarnar hesum viðvíkjandi í árinum.

Partafeløg o.tíl., sum landið eigur, verða bert tikin við undir ogn. Partabrøvini eru tikin við í roknskapin til keypsvirðið.

Kontuskipan í landsroknskapinum

Landsroknskapurin er býttur sundur í greinar. Løgtingið, løgmaður og landsstýrismenn hava sínar serstøku greinar, og ein felagsgrein er fyri inntøkur. Hetta eru sonevndu vanligu postarnir. Ársúrslitið fyri hesar postar verður nevnt RLÚ 1.

Óvanligu postarnir eru greinar hjá teim landsstýrismonnum, ið t.d. einskilja almennar fyritøkur o.tíl., rentur (frávik millum játtan og roknskap á grein 20) og serligar flytingar millum fíggjarlóg og Búskapargrunnin. Ársúrslitið fyri vanligar postar og óvanligar postar verður nevnt RLÚ 2.

Afturat teim vanligu og óvanligu postunum er ein felagsgrein fyri gjaldføri landskassans.

Allar tær skrásetingar, sum verða gjørdar í bókhaldi landsins, verða gjørdar upp ímóti fíggjarlógini. Fíggjarlógarkontustrongurin, sum er 11 talstavir langur, er tvinnaður saman, sum víst er niðanfyri.

Táttur nr.	Talstavur	Heiti á tátti
1	1-2	Grein
2	3-4	Málsøki
3	5	Virksemisøki
4	6-7	Høvuðskonta
5	8-9	Undirkonta
6	10-11	Standardkonta

Fíggjarlógarkontuskipanin sýnir, sum orðið sigur, hvussu fíggjarlógin er sett upp.

Grein, 1. táttur (løgtings, løgmans, landsstýrismanna ella felagsøki), virkar í høvuðsheitum soleiðis, at allar útreiðslur og inntøkur í einum løgtings-, løgmans- og landsstýrismansins ella felags øki standa undir eini grein. Undantøk eru í inntøku- og gjaldføris-greinunum, tó eru hesi undantøk ikki meira undantøk enn so, at inntøku- og gjaldførisgreinin er skipað undir Fíggjarmálaráðnum.

Málsøki, 2. táttur, eru tey øki, ein grein verður býtt sundur í. Hetta býtið er gjørt til tess at savna játtanir til somu endamál í landsstýrismannaøkjunum tvørtur um greinarnar og at vísa týdningarmikil endamál og útreiðsluskipanir. Fyrsti talstavur undir málsøkinum er - tó við nøkrum undantøkum - skipaður eftir altjóða stigi. Hetta ger, at tað grovliga ber til at bera ta føroysku fíggjarlógina saman við fíggjarlógir í øðrum londum.

Virksemisøki, 3. táttur, lýsir endamálið við játtanini.

Høvuðskonta, 4. táttur, er sjálv játtanin, sum Løgtingið atkvøður um. Ein høvuðskonta verður stovnað, tá ið hildið verður, at eitt endamál hevur sjálvstøðugan játtanarligan áhuga/týdning. Hetta sjónarmiðið skal tó verða borið saman við m.a. umsitingarlig og stýringarlig fyrilit.

Undirkonta, 5. táttur, kann verða nýttur, um so er, at tað í viðmerkingunum til fíggjarlógina er neyðugt at býta eina játtan sundur í fleiri verkevni, sum t.d. at skilja innihaldið í játtanini út, til tess at kunna gera funktionel hagtalslig býti ella at skilja partar av virkseminum út í inntøkufíggjað virksemi. Undirkontur verða eisini nýttar at skapa størri gjøgnumskygni í virksemið undir eini høvuðskontu, t.d. hevur hvør miðnámsskúli sína undirkontu undir høvuðskontuni fyri Miðnámsútbúgvingar. Undirkonta verður ikki nýtt til innanvirkis stýringarendamál.

Standardkonta, 6. táttur, er eitt tvørgangandi og standardiserað uppbýti av útreiðslum og inntøkum landsins og lagað til tey hugtøk, sum m.a. verða nýtt í tjóðarroknskapinum og til onnur hagtalslig endamál. Fyrsta talið í táttinum vísir høvuðsslagið. Fyrsta og annað talið tilsamans vísa á standardkontu, ið sundurgreinarútreiðslurnar í t.d. lønir, vørukeyp og tænastuveitingar. Tátturin er við fyrsta talstavi skipaður eftir 10 realbúskaparligum høvuðssløgum.

Høvuðssløg:

1: RAKSTRARÚTREIÐSLUR
2: RAKSTRARINNTØKUR
3: LØGUÚTREIÐSLUR
4: LØGUINNTØKUR
5: FLYTINGARÚTREIÐSLUR
6: SKATTIR OG FLYTINGARINNTØKUR
7: FLYTINGAR MILLUM ALMENNAR MYNDUGLEIKAR
8: FÍGGJARPOSTAR
9: BROYTING Í "VIRÐI" OG "SKULD V.M."
0: FÍGGJARSTØÐA

Annar talstavurin greinir høvuðsslagið enn gjøllari. Høvuðsslag 1, sum er "Rakstrarútreiðslur", verður t.d. greinað sundur í hesar standardkontur:

Høvuðsslag 1: Rakstrarútreiðslur

11 Lønir v.m.
14 Keyp av vørum og tænastum
15 Keyp av útbúnaði, netto
16 Leiga, viðlíkahald og skattur
17 Avskrivingar o.a.
19 Ymsar rakstrarútreiðslur

Roknskaparmeginreglur o.tíl.

Alment

Útreiðslur og inntøkur, sum stava frá vørum og tænastuveitingum, skulu verða skrásettar, tá ið tær eru latnar. Føroyar eru eitt fjarskotið land, og tað kann í desember vera sera trupult at fáa vørur heim til Føroyar sjóvegis fyri ársskiftið. Tí varð henda meginregla broytt í 2017, so vørur latnar fram til 15. februar kunnu verða skrásettar upp á árið frammanundan, um keypsavtala varð gjørd fyri árskiftið.

Í teimum førum útreiðslur ella inntøkur ikki stava frá vørum ella tænastuveitingum, skulu tær verða skrásettar, so skjótt upphæddin kann verða gjørd upp, og í seinasta lagi, tá ið goldið verður. Ein upphædd kann verða gjørd upp, um eitt rættarligt krav upp á eina væl greinaða upphædd kann gerast galdandi.

Um eitt munandi krav móti landinum, sum hoyrir til eitt ávíst fíggjarár, ikki kann verða gjørt upp endaliga, áðrenn roknskaparárið er lokið, skal upphæddin – grundað á eina meting - verða skrásett á eina útreiðslukontu í roknskapinum fyri tað fíggjarárið, og upphæddin verður rættað í tí fíggjarári, tá ið kravið endaliga kann verða gjørt upp.

Roknskaparliga verður skrásett eftir bruttomeginregluni, - tó so, at í sambandi við

- útlegg fyri aðrar almennar myndugleikar
- tryggingarendurgjøld
- lønarendurgjøld
- sølu av útbúnaði

verður konterað netto, sambært Kontuskipan landsins.

Landsroknskapurin er roknskapurin fyri undanfarna fíggjarár og fylgir álmanakkaárinum. Fýra ískoytisskeið eru knýtt til roknskaparárið. Fjórða ískoytisskeiðið verður bert nýtt til at skráseta tøkniligar broytingar, sí í partinum niðan fyri um "Broyting í roknskaparmeginreglum o.tíl." Fram til 1. apríl, eftir at fíggjarárið er endað, verður ávístur peningur av farnu fíggjarlógini fyri útreiðslur, sum havdar eru í farna fíggjarári.

Stovnar ella virksemi, sum ikki eru MVG-skrásett, skulu skráseta keyps-MVG fyri seg sjálvt á serligari rakstrarkontu fyri keyps-MVG. Sjálvur útreiðsluparturin verður skrásettur uttan MVG á standardkontu 14, 15, 16, 19, 31 og 32, meðan MVG-parturin verður skrásettur undir standardkontu 75. Snýr tað seg um MVG av vørum og tænastum, sum eru goldnar uttanlands, skal MVG-upphæddin verða skrásett saman við útreiðsluni fyri vøruna/tænastuna.

Mánaðarliga verður keyps-MVG lyft av teimum einkultu høvuðskontunum og flutt á eina felags játtan undir § 20.

Meginreglurnar fyri tíðarmarkan av lønarútreiðslum eru greinaðar í rundskrivi frá 18. desember 2017 frá Fíggjarmálaráðnum. Lønir verða útreiðslufördar í tí ári, tær eru innvunnar. Minstamark er fyri, nær meirtíð o.tíl. verður tikið við. Skyldug frítíðarløn fyri fastlønt verður útreiðsluførd í tí mánaði, hon verður útgoldin. Eftirløn til sáttmálasett verður útreiðsluførd og goldin tryggingarfeløgum saman við lønarútgjaldingini.

Tænastumannalønir verða tiknar við í raksturin í tí ári, tær verða goldnar. Sostatt er tað ikki broytingin í eftirlønarskylduni hjá landinum, sum verður tikin við í raksturin sum ein útreiðsla. Skyldan verður tó upplýst undir partinum Veðhalds- og eftirlønarskyldur. Fyri tænastumannalønt er tað landsstýrið, sum sjálvt rindar eftirlønir.

Húsaleiga verður útreiðsluførd í tí ári, goldið verður, sjálvt um partur av hesum útreiðslum eru goldnar frammanundan.

Í roknskaparkunngerðini er ásett, at tilsøgn um studning eigur at verða skrásett, tá ið hon er givin, men tikin við í játtanarroknskapin sambært meginreglunum í viðkomandi fíggjarlóg. Í játtanarlógini er ásett, at studningur verður rakstrarførdur í tí ári, tilsøgnin er givin.

Umlegging av lánum, veðhaldum og tílíkum frá eini undirkontu til aðra verður tikin við á játtanarroknskapin við eini negativari útreiðslu á tí undirkontu, sum lánið verður umlagt frá og við eini útreiðslu á tí kontu, lánið verður umlagt til. Báðar rørslurnar fara fram á somu standardkontu.

Niðanfyri verða roknskaparmeginreglurnar fyri nakrar høvuðskontur viðgjørdar.

Vanligur landsskattur (Persónsskattur): Inntøkurnar eru settar saman av hesum rørslum og við hesum innihaldi:
1. Fyribilsskattur 2025 er tann peningur, sum inn er goldin í fyribilsskatti skattaárið 2025 (gjaldsmeginregla).
2. Broyting í skattauppgerð 1984-2024 Broytingar í inntøkuførda skattinum árini frammanundan verða inntøku- / útreiðslufördar í 2025.
3. Endalig uppgerð, t.v.s. 1. uppgerð fyri 2024: Munurin millum tann pening, sum inn er goldin í 2024 og endaligu álíkningina fyri 2024 verður tikin við í roknskapin fyri 2025.

Felagsskattur o.tíl.: Grundarlagið undir skattaásetanini av feløgum fyri eitt ávíst skattaár er inntøkan hjá felagnum í tí roknskaparskeiði, sum gongur út ella fellur saman við tí farna álmanakkaárinum.

Vinningsbýtisskattur: Feløg, sum lata vinningsbýti, skulu rinda avgjald til landskassan. Skattur av vinningsbýti verður kravdur í tí sama fíggjarári, sum tað fellur til gjaldingar. Vinningsbýti, sum fellur til gjaldingar í 2025, verður sostatt tikið við í 2025.

MVG: Inntøkan verður førd á tað fíggjarárið, sum kravið er gjaldkomið. Av hesum skilst, at eitt krav, sum t.d. stavar frá síðsta ársfjórðingi í 2024, fellur til gjaldingar 10. februar í 2025 og verður tískil tikið við sum inntøka á fíggjarárinum 2025. Fyri

vikuavrokningar geldur tað, nær MVG-uppgerðin er lisin inn í skipanina hjá TAKS.

Endurgjald av meirvirðisgjaldi til kommunur: Kommunur, kommunal virkir og stovnar skulu rinda meirvirðisgjald til landskassan av virksemi sínum. Av hesum endurrindar landið 75% av útreiðsluni. Talan er um eina munandi upphædd. Tað hevur ikki verið samsvar millum, nær ein kommuna hevur tikið inntøkuna við og nær landið hevur tikið útreiðsluna við í roknskapin. Í 2022 varð hetta broytt soleiðis, at endurrindanin av meirvirðisgjaldi fer fram, tá ið kommunan hevur innrapporterað tíðarskeiðsroknskapin til Gjaldstovuna. Hetta ger, at tað í dag so at siga er 100% samsvar millum kommunur og land t.v.s., nær ávikavist inntøkan og útreiðslan verður tikin við.

Innflutnings-MVG, punktgjøld og tollur: Inntøkan verður ført á tað fíggjarárið, avgjaldsrokningin fer fram.

Vegskattur: Vegskatturin verður tikin við sum inntøka í tí ári, hann er fyri.

Skattarenta: Arbeitt verður við fýra rentusløgum í skattaskipanini. Tey eru: Endurgjaldsrenta, eykarenta, eykagjaldsrenta og morarenta. Tey trý fyrst nevndu sløgini verða øll útskrivað í sambandi við skattauppgerðina og verða ført sum ein inntøka/útreiðsla, tá ið kravið verður útskrivað.

Morarentan, sum liggur uttan fyri uppgerðina, verður ført sum inntøka, tá ið hon verður goldin.

Rentuinntøkur: Rentur av innistandandi peningi í peningastovnum verða inntøkuførdar sama árið, tær verða tilskrivaðar. Bókaðar rentur av útlánum landskassans verða virðismettar, og bert tann parturin, ið hevur nakað virði, verður tikin við í raksturin.

Inntøkur frá íløgurøkt: Landsbankin umsitur gjaldførið hjá landinum og metir um inntøkurnar á hvørjum árið. Frávikið verður flutt til § 80. Inntøkurnar samsvara við játtan til endamálið.

Rentuinnntøkur hjá Búskapargrunninum: Inntøkurnar eru partur av samlaðu íløgurøktini hjá landinum, men verða fluttar av játtanini undir § 20 og í grunnin

Yvirskot frá Danmarks Nationalbank: Tann parturin av yvirskotinum hjá Danmarks Nationalbank, sum Føroyar fáa tillutaðan, verður inntøkuførdur í tí ári, avroknað verður. Tað vil siga, at føroyski parturin av yvirskotinum fyri 2024 átti at verið tikin við í 2025. Men talið fyri 2025 var 0, tí einki varð lutað út.

Rentuútreiðslur av landskassalánum: Rentan verður ført á tað fíggjarárið, sum renturokningin er fyri. Dagatalið, sum nýtt verður at býta sundur rentuna á viðkomandi fíggjarár, er treytað av dagatalinum í lánsavtaluni. Broytist rentan í eini termin, og terminin er tvey fíggjarár, verður rentubroytingin somuleiðis tíðaravmarkað.

Kostnaðurin av lánsbrævarøðum fevnir um áljóðandi rentu, um møguligan útgávukursmun og um aðrar útgávukostnaðir (provisiónir, ráðgevingarkostnað o.tíl.).

Rentur í fremmandum gjaldoyra, ið ikki eru falnar, og sum verða tiknar við í játtanarroknskapin, verða tiknar við til gjaldoyravirðið tann 31. desember.

Kursvinningur/-tap av fremmandum gjaldoyra: Posturin, sum verður tikin við í játtanarroknskapin, fevnir um staðfest kurstap í roknskaparárinum og munin millum kursjavnaðu primo- og ultimosalduna í fíggjarárinum.

Lánsbrøv og broytingar í kursvirðinum: Árligu broytingarnar í keypsskála skrásetta kursvirðinum fyri lánsbrævaraðið talan er um, verða tiknar við undir raksturin.

Flytingar millum fíggjarlógina og Búskapargrunnin: Flytingar av tilfeingisinntøkum frá fiski- og alivinnuni verða gjørdar millum fíggjarlógina og grunnin á høvuðskontunum undir § 20. Talan er um inntøkur frá fiski- og alivinnuni oman fyri ávikavist 350 og 250 mió. kr. árliga. Inntøkurnar verða fluttar í fíggjarlógina aftur javnt yvir 7 ár.

Aðrar flytingar millum fíggjarlógina og grunnin verða gjørdar á § 89, t.d. partur av RLÚ I úrslitinum ella søla av almennum virksemi.

Avskriving og avseting ímót tapi av skuldarum

Avskriving: Krøv verða avskrivað, tá ið tey hava mist rættargildið ella verða strikað (eftirgivin).

Avseting: Í roknskapinum verður sett av ímóti tapi, tá ið útlit eru til, at ikki alt verður goldið, ella at trygd ikki fæst fyri kravinum.

Tað er ymiskt, hvussu viðgerðin av krøvum fer fram í landsroknskapinum. Í talvuni niðanfyri er nágreiniligari greitt frá samanhangunum.

Yvirlit yvir samanhangin millum inntøkur/útreiðslur, avseting og avskriving á rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu

	Viðgerð í rakstrarroknskapi	Viðgerð í fíggjarstøðuni
Lán*)	Tá ið lán verða veitt (útgoldin), verða hesi skrásett sum útreiðsla í rakstrarroknskapinum á standardkontu 82.	Lánini verða eisini skrásett í fíggjarstøðuni á útbúnaði undir postinum lán, og verður mótposturin tikin við á útjavningarkontu undir postinum ymsar broytingar.
	Sett verður ikki av móti tapi á rakstrarroknskapinum, tí lánið er longu tikið við sum útreiðsla.	Lánini verða javnað á serligari avsetingarkontu undir standardkontu 02 við tí, sum verður mett virðisleyst. Mótposturin verður førdur á útjavningarkontu 05.
	Verða lán avskrivað, verður avskrivingin bæði tikin við sum inntøka og útreiðsla í rakstrarroknskapinum við somu upphædd ávikavist á standardkontu 52/53 og 86.	Tað verður eisini gjørd ein avskriving á sjálvari fíggjarstøðuni. Lánið verður avskrivað, og Mótposturin verður tikin við á útjavningarkontuni undir postinum ymsar broytingar
Skatta-eftirstøð-ur	Skattainntøkurnar verða førdar á standardkontu 61.	Skattakravið verður skrásett í fíggjarstøðuni á postinum Skatta-, toll- og tílíkir skuldarar.
	Inntøkurnar verða javnaðar við, hvat roknað verður sum virðisleyst. Virðisleys krøv ávirka tí raksturin.	Eftirstøðurnar verða javnaðar við roknaðu virðisleysu upphæddini á serligari avsetingarkontu. 1. ár undan inniverandi roknskaparári: 20 % av debitoarsaldu 2. ár undan inniverandi roknskaparári: 40 % av debitorasaldu 3. ár undan inniverandi roknskaparári: 60 % av debitorasaldu 4. ár undan inniverandi roknskaparári: 80 % av debitorasaldu 5. ár og meira undan inniverandi roknskaparári: 100% av av debitorasaldu
Toll-o.tíl. eftirstøð-ur	Avgjaldsinntøkurnar verða førdar á standardkontu 61.	Kravið verður skrásett í fíggjarstøðuni á postinum Skatta-, toll- og tílíkir skuldarar.
	Sett verður ikki av móti tapi í rakstrarroknskapinum. Virðisleys krøv ávirka tí ikki raksturin.	Eftirstøðurnar verða javnaðar við virðisleysu upphæddini á serligari avsetingarkontu á postinum Skatta-, toll- og tílíkir skuldarar. Mótposturin til avsetingina verður tikin við á útjavningarkontuni undir postinum ymsar broytingar.
	Avskrivingar/strikingar verða tiknar við sum útreiðsla á serligari kontu undir standardkontu 61.	Áognin verður avskrivað svarandi til avskrivingina ella eftirgevingina.
Aðrir skuld-arar (Vøru- og tænastus kuld)	Tá ið vørur og tænastur verða latnar, verða hesar veitingar tiknar við sum inntøka í rakstrarroknskapinum.	Søla av vørum og tænastum, latnar upp á borg, verður skrásett sum áogn í fíggjarstøðuni.
	Avsetingar ímóti tapi upp á skuldarar verða skrásettar sum útreiðsla á standardkontu 17.	Tað, sum verður sett av ímóti tapi á standardkontu 17, verður tikið við á serstakari avsetingarkontu í fíggjarstøðuni undir standardkontu 03.
	Um sett er av frammanundan ímóti tapi, verður avskriving av skuldara ikki tikin við í rakstrarroknskapinum.	Áognin verður avskrivað, og mótposturin verður tikin við á avsetingarkontu undir standardkontu 03.
	Er ikki frammanundan sett av ímóti tapi, verður avskriving av skuldara tikin við sum útreiðsla á standardkontu 17.	Áognin verður avskrivað svarandi til útreiðsluna á standardkontu 17.

Skatta, toll- o.tíl. eftirstøður (Barna-peningur)	Tá ið barnapeningur verður rindaður út í forskoti, verður hesin tikin við sum ein útreiðsla á standardkontu 52. Afturgjald verður tikið við sum ein inntøka á somu kontu. Árliga nettogjaldið á høvuðskontuni, sum vanliga er ein útreiðsla, tí tað eru fleiri, sum mishalda afturgjaldsskylduna, verður tikið við í roknskapin sum ein útreiðsla.	Útleggið verður eisini skrásett á fíggjarstøðuni undir standardkontu 03, og verður mótposturin tikin við á serliga kontu undir útjavningarkontu, standardkonta 05.
	Sett verður ikki av móti tapi í rakstrar-roknskapinum, tí útleggið er longu tikið við sum ein útreiðsla (sí omanfyri).	Áognin verða javnað við virðisleysu upphæddini á serligari avsetingarkontu undir standardkontu 03. Mótkontan er serlig konta undir útjavningarkontu, standardkonta 05.
	Avskriving, do avseting omanfyri.	Ein avskriving á fíggjarstøðuni fer fram við, at útleggið verður av-skrivað, og mótposturin verður skrásettur á serligu avsetingarkontuni.

*) Sama meginregla er galdandi fyri viðgerðina av partabrøvum.

Fíggjarstøða landsins

Smb. roknskaparlógini skal roknskapurin eisini fevna um aktiv og passiv landsins og broytingarnar hesum viðvíkjandi.

Fíggjarstøðan í roknskapinum verður sett upp í kontuformi. Tískil stendur ogn á einari síðu, og útjavningarkonta og skuld standa yvir av henni, á hini síðuni.

Internu grunnarnir eru tiknir við í fíggjarstøðuna hjá landinum. Ognirnar hjá grunnunum (tøkur peningur og útlán) eru settar undir teir ymsu aktivbólkarnar í fíggjarstøðuni og passivini undir "Útjavningarkontu". Tó verður "eginognin" hjá Búskapargrunni Føroya greinað fyri seg undir útjavningarkontu landsins. Ein uppseting av aktiv og passiv hjá internu grunnunum er eisini sett upp fyri seg.

Bygningar, løgur, útbúnaður o.tíl.: Ognir og tílíkt verða útreiðsluførdar í sambandi við, at tær verða útvegaðar, og verða ikki tiknar við í fíggjarstøðuna, tí landið ikki hevur meginreglur fyri ella krøv um, hvussu almennar ognir verða virðismettar.

Goymslur verða vanliga ikki aktiveraðar í landsroknskapinum. Roknskaparkunngerðin ásetur, at virðið á vørugoymslunum skal ikki verða tikið við á goymslukonturnar í roknskapunum hjá stovnunum, uttan so er, at játtanarheimild er til tess. Bert Rúsdrekkasøla landsins, Apoteksverkið, Landsverk og Strandfaraskip landsins hava tikið vørugoymslu við í roknskapin. Harafturat eru fýra stovnar, sum hava skrásett lítla vørugoymslu.

Keypsskála skrásett virðisbrøv: Keyp av keypsskála skrásettum virðisbrøvum verða tikin við í roknskapin sum ein útreiðsla, og verða tey samstundis førd í fíggjarstøðuna undir "Keypsskála skrásett virðisbrøv". Keypsskála skrásett virðisbrøv landskassans eru tikin við í roknskapin til dagsvirði.

Virðisbrøv: Keyp av partabrøvum verða tikin við í roknskapin sum ein útreiðsla, og verða tey samstundis førd í fíggjarstøðuna undir partabrøv. Partabrøv landskassans eru tikin við í roknskapin til keypsvirði.

Lán til sjálvsognarstovnar og til kommunur standa í roknskapinum við nettovirðinum 0, tí talan er um treytað lán, sum bert skulu verða goldin aftur, um bygningar o.tíl, sum lán er veitt til, verða nýtt til annað enn endamálið, ið varð stuðlað – ella um ognirnar verða seldar.

Av tí at fíggjarstøðan skal sýna eina sanna mynd, eru nakrir postar undir "Ogn" javnaðir. Mett er, hvussu stórur partur av hesum postum er virðisleysur. Virðisleysi parturin er tikin við sum "Avsett móti tapi". Javningin fyri postarnar "Útlán" og "Skatta-, toll- o.tíl. skuldarar" er ikki tikin við yvir raksturin, men beinleiðis yvir útjavningarkontu. Virðisleysi parturin av "Aðrir skuldarar" verður tikin við yvir raksturin. Um talan er um avseting fyri vørur og tænastur, verður virðisleysi parturin tikin við á standardkontu 17. (Sí meira um hetta í yvirlitinum omanfyri um avseting og avskriving).

Tøkur peningur: Landskassin skal sambært lóg hava tøkt gjaldføri at standa ímóti búskaparligum bakkøstum. Ein partur av hesum gjaldføri er sett í virðisbrøv og tílíkt, sum er skjótt umsetiligt. Tí verða hesi virðini tikin við á fíggjarstøðuni á tøkum peningi undir postinum Virðisbrøv og tílíkt.

Útjavningarkonta: Endamálið við útjavningar-kontuni er sera ólíkt "Kontu fyri eginpening" í einum privatum virki. Virðið av aktivunum verður t.d. ikki mett á sama hátt, og ognir og løgur verða heldur ikki førdar í roknskapin. Hetta snýr seg tí ikki um kontu fyri veruliga eginogn landskassans, men heldur um eina javnvágarkontu, sum í størri mun hevur ein tøkniligan leiklut. Undir útjavningarkontu verða vístir tveir postar. Fyrri posturin er eginognin í Búskapargrunni Føroya, sum verður víst serskilt, hóast grunnurin er ein partur av landskassanum.

Í notuni til postin, verður greitt frá teim flytingum, sum verða gjørdar í grunnin og úr grunninum.

Hin posturin, sum verður róptur "Ymsar broytingar" fevnir í 2025 um:

1. broytingar í avsetingum
2. mótkontu til útlánsroknskap (tøknilig konta)
3. úrslit í Barsilsgrunninum

Langfreistað skuld: Rentan verður førd á tað fíggjarárið, sum renturokningin er fyri. Sostatt verða ikki falnar rentur tiknar við í postin "Langfreistað skuld". Tann skuld, sum er í fremmandum gjaldoyra, er javnað við gjaldoyravirðinum við ársenda. Emissiónskursmunur og broytingar í kursvirðinum á brævalánum verða eisini tikin við undir "Langfreistaðari skuld".

Millumrokningar við kommunur o. tíl.: Ein týdningarmikil táttur í búskaparliga rensli landsins eru búskaparligu viðurskiftini millum almennar búskaparligar eindir. Gjaldstovan er "clearingstovnur" og virkar sum eitt slag av almennum banka. Tað er eitt krav, at allar flytingar millum almennar eindir skulu fara um avrokningarskipanina hjá landinum. Talan er um hesar eindir:

- Land
- Kommunur
- Kommunal samstørv
- Onnur t.d. Føroya Stiftsstjórn og Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin

Fleiri av hesum eindunum eiga pening til góðar hjá hvørjum øðrum, samstundis sum eindirnar kunnu skylda hvørjum øðrum pengar. Gjaldstovan ger mánaðarliga upp millumverandi millum allar eindirnar og avroknar nettoupphæddina. Skuldi tað hent, at ein av eindunum kemur í undirskot, tá ið avroknað verður, leggur landið munin út.

Undir *"Tíðaravmarking, ogn" og "Tíðaravmarking, skuld"* verða ávikavist bert frammanundan goldnar útreiðslur sum t.d. løn og haldaragjøld og inngjaldingar fyri krøv, sum ikki verða tilskrivað fyrr enn eftirfylgjandi roknskaparskeið (sum t.d. vegskattainngjaldingar í desember fyri vegskattakrøv árið eftir), tiknar við.

Broyting í roknskaparmeginreglum o.tíl.

Tá ið skrásetingarmeginregla verður broytt, annaðhvørt í einstøkum føri (sum t.d. at rætta skeivar bókingar í einum farnum fíggjarári) ella sum ein varandi broyting, fer hetta - tó treytað av, hvør broytingin er - at bera við sær tøkniliga treytaðar meirútreiðslur/meirinntøkur ella minni útreiðslur/minni inntøkur. Hesar tøkniliga treytaðu útreiðslur/inntøkur skulu ikki verða tiknar við sum útreiðslur/inntøkur í játtanarroknskapinum. Í staðin skulu roknskaparpostar við ársbyrjan í tí fíggjarárinum, sum broytingin verður gjørd, verða lagaðir til soleiðis, at teir vísa ta upphædd, teir høvdu havt, um so var, at broytingin varð gjørd fyri viðkomandi fíggjarár. Tillagingin er víst við notu (sí partin javning av fíggjarstøðu við ársbyrjan) til fíggjarstøðuna í landsroknskapinum.

Játtanarreglur

Fíggjarlógin er sjálvt grundarlagið undir virksemi landsins í einum fíggjarári.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum samskipar fíggjarlógararbeiðið. Tað er tí hann, sum landsstýrisins vegna leggur uppskot landsstýrisins um fíggjarlóg og aðrar játtanarlógir fyri Løgtingið.

Stýrisskipanarlógin hevur nakrar heilt fáar yvirstaddar reglur um játtanarskipanina. Sambært stýriskipanarlógini skal eingin útreiðsla verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, sum er í gildi, tá ið ávíst verður. Eisini verður ásett, at skattir o.tíl. ikki kunnu verða kravdir, fyrr enn fíggjarlóg ella bráfeingis fíggjarlóg er samtykt á Løgtingi.

Í lóg um landsins játtanarskipan fekk játtanarskipanin, sum var galdandi frá 1997 til 2009, lógarstatus. Innihaldið í játtanarskipanini var m.a.:

- viðurskifti í sambandi við fíggjarlógina
- spurningurin um bruttojáttanir og nettojáttanir
- átekningar sum ískoytisáseting til ávísa játtan
- ræðisásetingar
- flyta játtan millum ár
- serstakar ásetingar, sum knýta seg til skipað játtanarsløg
- nýggjar og broyttar atgerðir í árinum

Umframt at lógarfesta játtanarskipanina, fekk landsstýrismaðurin eisini heimild at áseta neyvari reglur um t.d. stuðulsfyrisiting og um uppsetan og innihald av fíggjarlógini.

Lógin um játtanarskipan ásetur, at fíggjarlógin skal í síni uppsetan fylgja roknskaparmeginreglunum.
Í lógini er m.a. ásett, at tað við átekning kann verða givin heimild at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár. Harafturat er ásett, at studningur verður skuldskrivaður rakstrinum í tí ári, tilsøgnin er givin. Niðanfyri verður greitt neyvari frá um játtanir og játtanarsløg.

Á játtanarlógunum eru ikki bert játtanir, men eisini átekningar. Átekningar verða nýttar sum ein ískoytisáseting til ávísa játtan.

Ein játtan er ein heimild hjá landsstýrismanninum at hava útreiðslur til eitt ávíst endamál, ella at hava inntøkur av ávísum slag í samsvar við tær fyritreytir, sum játtanin er givin eftir.

Tá ið ein fyrisitingarlig leiðsla hevur ræðisrættindi í sambandi við játtanir, so er tað eftir *heimiling* frá landsstýrismanninum, og er tað eisini sambært teimum treytum, ið fylgja við heimilingini.

Játtanin skal verða nýtt samsvarandi fyritreytunum fyri játtanini. Harumframt kunnu í heimilingini verða ásettar aðrar fyrisitingarligar treytir fyri at nýta játtanina, eins og ræðisrætturin altíð kann verða tikin aftur í fíggjarárinum.

Ræðisreglurnar eru tengdar at fylgjandi fýra játtanarsløgum:

- Rakstrarjáttan
- Løgujáttan
- Lógarbundin játtan
- Stuðulsjáttan

Á fíggjarlógini og samsvarandi landsroknskapinum er ásett í klombrum aftan fyri høvuðskontuheitið, hvat slag av játtan talan er um. Tó ikki á játtanunum á grein 20 og 25.

Játtanarslagið er treytað av tí stýrisslagi, ið ynskt verður:

Rakstrarjáttan verður sum grundarlag nýtt, um endamálið við játtanini serliga er ætlað at verða rokkið við almennum rakstrarvirksemi, t.e. við at seta starvsfólk og at hava neyðugar útreiðslur í tí sambandinum. Uppi í hesum er at keypa tilfar og tænastur og at reka bygningar. Rakstrarjáttan er ein nettoútreiðslujáttan, og merkir tað, at meirinntøkur loyva samsvarandi meirútreiðslum.

Løgujáttan verður sum meginregla nýtt at selja, keypa, konstruera og gera bygningar og løgur. Harumframt verður henda játtanin nýtt, tá ið løgustuðul ella útlán verða veitt til ítøkiligar byggiætlanir, sum ikki eru lógarbundnar.

Lógarbundin játtan verður nýtt, tá ið tað er bindandi ásett í aðrari lóggávu, hvør kann fáa pening, ella hvør skal rinda, og hvussu stór upphæddin skal vera.

Stuðulsjáttan verður nýtt í serligum førum, tá ið játtanarendamálið er ætlað at vera rokkið við at veita stuðul, lán o.tíl, ella við at fáa til vega inntøkur, sum ikki eru náttúrliga knýttar at rakstrar- og løguvirkseminum.

Vanliga verður hetta játtanarslag nýtt, um hini játtanarsløgini ikki hóska.

Fluttar løgujáttanir

Játtanarskipanin ella Lógin um játtanarskipan heimilar, at við átekning kann óbrúkt løgujáttan verða flutt til seinni fíggjarár.

Treytað av, at øll løgujáttan fyri árið, átekningin er givin fyri, ikki er brúkt, verður játtanin lækkað sambært átekningini, tó í mesta lagi so nettojáttan svarar til nýtsluna. Óbrúkta játtanin verður skrásett á standardkontu 36 *Løgujáttan at flyta til næsta ár*. Løgujáttanin fyri árið, sum óbrúkta løgujáttanin verður flutt til, verður skrásett á standardkontu 35 *Løgujáttan flutt frá síðsta ári*, so játtanin fyri hetta árið verður hækkað við óbrúktu upphæddini fyri árið frammanundan.

Í partinum Fluttar løgujáttanir verður greitt frá, hvørjar óbrúktar løgujáttanir verða fluttar.

Grannskoðan og góðkenning av landsroknskapinum

Sambært § 45, stk. 1, í Ll. nr. 103 frá 26. juli 1994 um stýrisskipan Føroya og sambært § 1, stk. 1, í Ll. nr. 33 frá 23. mars 1994 um landsins almenna roknskaparhald v.m., skal landsroknskapurin verða lagdur fyri Løgtingið í seinasta lagi fimm mánaðir eftir fíggjarárslok.